# LISA 2008/09

## Listafólkaskattur

Á heimasíðuni hjá LISA liggja reglur um skattaviðursskiftini hjá listafólkum, sum vit hava arbeitt ígjøgnum, út á heimasíðuna hjá LISA, og har ber til at síggja, hvussu listafólk skulu gera viðvíkjandi skatti. Øll listafólk eru meiri enn kærkomin at senda inn dømi um, hvussu teirra skattaviðurskifti eru, soleiðis, at vit hava nøkur fordømi at vísa á, tá ið vit eina ferð fáa fatur á rætta viðkomandi úti á fíggjarmálaráðnum. Tað er av alstórum týdningi, at hesi fordømi verða skjalfest og kunnu brúkast til at bøta um skattaviðurskiftini hjá listafólkum.

## Listaráð

Á várið í 2008 setti táverandi mentamálaráðharri, Kristina Háfoss, ein bólk at arbeiða við at endurskoða Mentanargrunn landsins (MGL). Í hesa nevnd vórðu vald: Martin Næs og Alda Joensen frá MMR, Rói Patursson, Oddfríður Marni Rasmussen, Urd Johannesen, og Kinna Poulsen. Ráðharrin vildi hava okkum at hyggja eftir, hvussu hini norðurlond og onnur við høvdu skipa stuðulsskipanir til listaøkið. Vit samdust rættiliga skjótt, at MGL skuldi broytast til eitt listaráð. Tær kontur í Mentamálaráðnum, sum fulltrúar har umsótu, og sum vóru eftir umsókn, skuldu flytast í hetta listaráðið, sum síðani skuldi viðgera ómsóknirnar. Hetta skal gerast so, fyri at fulltrúarnir í MMR ikki skulu sita og døma um eina umsókn, sum teir ikki hava skil fyri, samstundis skuldi hetta lætta um teirra longu frammanundan tyngjandi arbeiði.

## ECA

Vit eru enn limir í ECA, men sum undanfarin ár, so hava vit ikki verið til nakrar fundir har, tí at vit hava valt at brúkt orkuna til norðurlendskt samstarv, heldur enn europiskt samstarv. Tó hava vit roynt gjøgnum ECA, umboð Tjóðveldsins á Fólkatingi og Uttanríkismálaráðið at kanna um vit kunnu fáa úr týðarapengunum í ES. Íslendarar njóta gott av hesum týðarastuðli, og nógvar íslendskar bøkur verða týddar úr málum innan ES. Svarið vit hava fingið er tíanverri ikki serliga positivt. Vit fingu at vita frá fólkatingsliminum og uttanríkismálaráðnum, at eftirsum at Føroyar ikki er ein tjóð og tí ikki hevur eitt mál, men er eitt minnilutamál, so kunnu vit ikki fáa stuðul haðani. Tað er ógvuliga tyngjandi boðskapur, tí at eitt nú fróðskaparsetrini í Íslandi njóta gott av hesum stuðli. Europiskar frøðibøkur verða týddar til íslendskt við hesum stuðli. Hesar verða brúktar á íslendskum fróðskaparsetrum. ECA hevur eisini verið inni í málinum, men tey siga seg heldur ikki fáa gjørt nakað, men

málið er ikki niðurlagt. Vit ætla okkum at arbeiða víðari við hesum, so at vit eisini kunnu fáa ES-stuðul til at týða tilfar til landið.

## Norðurlendskt samstarv

LISA var á fundi við hini norðurlendsku listafólkasambondini hin 23. Oktober 2009. Á fundinum viðgjørdu vit ymisk evni. Eitt nú endurskoðaðu vit Kulturkontakt Nord. Í hesum sambandi kom Mogens Jensen, talsmaður fyri mentan í danska Javnaðarflokkinum á fundin. Hann greiddi frá um tær sparingar í Kulturkontakt Nord, sum lógu í kortinum. Fólk sum hann, høvdu talað fyri, hvussu stóran týdning tað hevur, at listalívið í norðurlondum verður stuðlað, og teir fingu minkað um skaðan soleiðis, at bara 2 milliónir vórðu skarvaðar av norðurlendsku játtanini og ikki tær 8 milliónirnar, sum ætlanin var at máa burtur.

Annað evnið, sum var frammi, var at vit hava í hyggju at seta á stovn eitt norðurlendskt listafólkasamband, har formenninir í listafólkasambondunum í hvørjum landi mynda norðurlendska listafólkasambandið. Hetta verður gjørt, tí at so kunnu vit standa betur saman, nú tað sýnist sum um politikarar í øllum norðanlondum hava misskilt, hvussu stóran týdning skapandi og útinnandi list hevur fyri samfeløgini og fyri tann norðurlendska samleikan.

Eisini viðgjørdu vit seinasta mentanartingið, ið var á Gotlandi. Vit kundu hugsað okkum at havt mentanartingið í Føroyum næstu ferð. Men tað er ov skjótt at stápla slíkt á beinini til 2009. Tí samdust vit um at skjóta freistina út til 2011. Hetta tí at tað tekur tíð at samskipa og søkja pengar til eina slíka ráðstevnu og fyri at fáa eitt sindur av tíðarfjarstøðu frá seinasta mentanartinginum. Vit fara at leggja eina ætlan til mentanartingið, sum skal haldast í Føroyum í 2011. Vit søgdu beinleiðis á fundinum, at vit vildu gjarna hava fundin í Føroyum fyri at fáa eitt sindur av fjarstøðu frá teimum Baltisku londunum. Tað hevur víst seg, at ofta verður hugsað meir um londini eystanfyri enn um okkum, sum liggja her í norðuratlantshavinum.

Til hetta góða ting krevst, at ymiskir aðrir stovanr vera við. Eitt nú Uttanríkismálaráðið, Mentamálaráðið, Norðurlandahúsið og onnur. Stuðulspengar skulu eisini søkjast og her er ikki talan um smáar upphæddir.

Við kvøðu

Oddfríður Marni Rasmussen, formaður